**§52a spurningur til Løgmann**

**um ósamsvar millum fíggjarkarmar 2014-2018 og heildarætlanina fyri fólkavøkstur**

**Spurningar**

1. Ætlar Landsstýrið, at fíggjarkarmarnir fyri 2014-2018 skulu broytast áðrenn 2. viðgerð og atkvøðugreiðslu í málinum á Løgtingi?

2. Kemur Landsstýrið við broytingaruppskoti til fíggjarkarmarnar til fíggjarnevndina - so samsvar er millum heildarætlan og fíggjarkarmar - áðrenn 2. viðgerð og atkvøðugreiðslu í málinum?

3. Ella skal Fíggjarnevndin fremja neyðugu broytingarnar, so samsvar er millum heildarætlan fyri fólkatilflyting og fólkavøkstur og fíggjarkarmarnar fyri 2014-2018 ?

4. Ætlar Løgmaður at fíggjarlógin fyri 2014 skal halda seg innan Fíggjarkarmarnar fyri 2014 ?

**Viðmerkingar**

Í undanfarnu viku vórðu tvey umfatandi mál frá landsstýrinum viðgjørd.
Fíggjarkarmar fyri 2014-2018 og Heildarætlan fyri fólkatilflyting og fólkavøkstur.

Um hugt verður at hesum báðum málum er so stórur munur, at hesi kundu komið frá tveimum ymiskum landsstýrum. Tí heildarætlanin er als ikki at síggja í fíggjarkørmunum fyri 2014-2018.

Samstundis hevur Løgmaður á almennum fundi 09.04.2013 fráboðað, at í fíggjarlógini fyri 2014 skal heildarætlanin síggjast aftur.

Í lóg um játtanarskipan landsins verður ásett:

"§ 8. Fyri 1. apríl leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar.
...
Stk. 3. Hvør landsstýrismaður ger innan fyri tillutaða játtanarkarmin sín part av fíggjarlógaruppskotinum."

Púra greitt er sostatt, at sambært lóg skulu landsstýrisfólkini halda seg innan tillutaða fíggjarliga játtanarkarmin, sum verður samtyktur í vár, í fíggjarlógaruppskotinum sum kemur í heyst. Tí er alneyðugt, at skal t.d. hægri útbúgving, betrað barsilsskipan og betri kor til stakar uppihaldarar við í fíggjarlógina fyri 2014, so má hetta við í fíggjarkarmin hjá viðkomandi landsstýrisfólkum - nú áðrenn fíggjarkarmarnir fyri 2014 koma til 2. viðgerð og atkvøðugreiðslu í Løgtinginum.

Hóast lógarásetingina, so helt fíggjarlógin fyri 2013 seg tó ikki innanfyri samtyktu fíggjarkarmarnar fyri 2013.Tí varð landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í heyst kærdur av andstøðutinglimunum í Fíggjarnevdnini til Landsstýrismálanevndina um brot á játtanarlóg landsins. Enn verður bíðað eftir svari.

Sera ógreitt tykist vera um Landsstýrið kemur við broytingaruppskoti til fíggjarkarmarnar fyri 2014-2018, soleiðis at hesir samsvara við heildarætlanina, ella um neyðugt verður at Fíggjarnevndin skjálv skal fremja neyðugu broytingarnar í fíggjarkørmunum, áðrenn hesir verða latnir aftur til 2. viðgerð og atkvøðugreiðslu á Løgtingi.

Fyri at fáa lýst málið verða hesi spurningar settir Løgmanni, ið vónandi verða svaraðir skjótast møguligt, tí málið liggur í Fíggjarnevndini og skal innan stutta tíð til 2. viðgerð og atkvøðugreiðslu á Løgtingi.

Á Løgtingi, 10. apríl 2013

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna og fíggjarnevndarlimur fyri Tjóðveldi